LM-099/2023

Fylgiskjal 55

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tinganes

Postboks 377

FO-110 Tórshavn

Hoyringarskriv frá Fugloyar kommunu.

Landafrøðiliga er uppskotið ikki umsitingarliga jaligt fyri útjagaranum og útoyggjar og kann tað, soleiðis sum tað sær út júst nú, føra við sær niðurlaging av verandi menning. Somuleiðis kann hetta føra við sær eina rímuliga stóra rokning fyri menning av undirstøðukervinum og ikki minst kemur hetta at krevja eina munandi meiri umfatandi fyrisiting, sum eisini verður send út til kommunurnar at umsitað. Flestu kommunur í dag eru hart sperdar og tíðskil verður hetta bara enn ein steinur omaná byrðu.

Føroyar er í sær sjálvum ikki nakað burðardygd ferðamál, serliga tá ið hugsa verður um okkara geografisku staðseting miðskeiðis í Atlantshavinum og tíðskil er tað okkara fatan, at vit megna best at stýra tilgongdini og menningini sum sjálvstøðug kommuna.

Fyri Fugloyar kommunu, sum er eitt náttúruøkið burturav, har serliga seyðahald er ein stórur partur av aktivitetinum í oynni, taka vit ikki undir § 3, sum eftir okkara tykki førir við sær óskipaði viðurskiftir. Somuleiðis meta vit, at galdandi lóggáva á økinum í dag, tá ið talan er um hagarøkt, er bæði nøktandi og umráðandi til at hava skipaði viðurskiftir fyri Fugloynna.

Almannarættur og skipaði viðurskiftir eru hvør sítt øki.

Grundsúlan undir føroysku ferðavinnuni er tann, at "fólk úr allari verðini streyma til fyri at síggja náttúruna og vilja sleppa út á ytstu punkt í Føroyum". Tað vil siga, at tað er sjálv atgongdin til at ganga í náttúruni, sum er tænastan, føroyska ferðavinnan hevur at bjóða, og sum risastórur eftirspurningur er eftir.

Tað er tí lítið skilagott at mæla til, at ferðafólk ikki skulu gjalda fyri ta tænastuna, tey koma til Føroya fyri at fáa. Tvørturímóti má tað vera høvuðsuppgávan at finna prísir fyri tænastuna (atgongd til ymsu náttúruperlurnar), eftirspurningur er eftir at vitja, soleiðis at

1) túratalið til hvørt einstakt øki kemur á eitt støði, sum ítøkiliga økið kann bera

2) tey, sum eiga/umsita økið, forvinna so nógvan pening sum gjørligt burtur úr at selja atgongd til økið.

Ivasamt er eisini hvussu ein slíkur býtislykil, man leggur upp til, kann brúkast til nakað sum helst, tí tann ábyrgdin man ynskir at leggja á kommunurnar, er munandi meiri kostnaðarmikil tá hugsa verður um kommunalan íløgutørv. Í fleiri førum verða kommunur noyddar at hækka skattaprosent

fyri at finna pening til íløgurnar, og tá verður sera trupult at fortelja fyri skattgjaldaranum at henda hækking má til, fyri fríða atgongd til okkara náttúru.

Fyri okkara viðkomandi er Fugloyggin langt aftanfyri allar raðfestingar, tá ið talan er um viðlíkahaldi av landsveganetakervinum, lendingum vm. – fyri so at krevja av kommununi at útbyggja samfelagið til ferðafólk – ið bert skulu gjalda eitt gjald – sum als ikki svarar til nakað sum helst, ið kallast íløgur, menning og viðlíkahald av undirstøðukervinum.

Vit ynskja burðardygga ferðavinnu á bygd og halda fast um okkara aldargomlu siðsøguliga mentan, serliga tá ið talan er um náttúruvernd, seyðahald, fuglalív og hagarøkt.

Vit ynskja ikki hópferðavinnu í Føroyum.

Niðurstøðan er tann, at sjálvandi halda vit at føroyingar kunnu ferðast frítt í Føroyum, við ábyrgd eftir teim galdandi reglum staðfestir í lóg.

Um man ikki skipar viðurskiftini nøktandi og tekur eitt gjald, verður talan um:

- Óskipaða gongd
- Ótalmað slit
- Ikki burðardygt
- Ongar inntøkur
- Ongin friður

Um man hinvegin skipar viðurskiftini og tekur eitt gjald, verður talan um:

- Skipaði viðurskiftir
- Tálmað slit
- Meiri burðardygt
- Lokalar inntøkur
- Betri friður

Harafturat hava skipaði viðurskiftir meiri gróðrarlíkindi fyri menning av ferðavinnu lokalt, serliga hugsa um ferðaleiðslu og tænastur.

Tá ið vit hugsa eitt gjald, so er í høvusheitinum talan um eina trýrættaða skrá:

1. Ferðaleiðsla, sum er mvg-frí
2. Atgongugjald, sum er við mvg og sostatt eisini gevur inntøkur til landskassan. Um vit t.d. siga, at atgongugjaldi er kr. 125,00 v/ mvg – so fella kr. 25,00 í landskassan og restin verður nýtt til at menna og viðlíkahalda gøtur, skelting vm. – Fyrimunurin við at hava eitt hagagjald, sum inniheldur mvg, er at tú kanst fáa mvg endurrindan í samband við íløgur og rakstur av undirstøðukervinum.

3. Tænastugjøld eru eisini við mvg, tvs. at t.d. matpakkar, matur og tænastur annars. Hetta førir við sær, at umframt at talan er um ein menningarpart lokalt, so fær landskassin eisini beinleiðis inntøkur av ferðavinnuni.

Viðmerkjast skal, at henda skipan bert umfatar handilssliga ferðavinnu og ikki tann vanliga føroyingin.

Hetta eigur at verða ein leistur sum øll kunnu svølgja og vit fáa eina burðardygga ferðavinnu í lokalsamfelagnum, sum gevur beinleiðis avkast til lokaløkini og ikki minst, í landskassan eisini.

Somuleiðis er okkara áheitan til mynduleikarnar, at ístaðin fyri at koma við einari ferðavinnulóggávu, áðrenn man hevur eina greiða lendisætlan fyri Føroyar, kan verða sera trupult.

Tørvur er á eini lendisætlan tí:

- eingin samskipað planlegging
- nógvir spjaddir áhugapartar (Land, kommunur, ferðavinna, landbúnaður)
- eingin landbúnaðarpolitikkur

Lendisætlan fyri Føroyar eigur at umfata øki til:

- landbúnað
- ferðavinnu
- frítíð
- orku
- náttúrvernd og friðing
- samferðsla
- býar/bygda vøkstur

Vit skjóta upp eina skipaða tilgongd, sum tryggjar lokala ávirkan / avgerð - gjøgnumskygni / luttøku - avdúkar møg. ósemjur/konfliktir - kunning og tillaging – so kunnu vit røkka málinum munandi burðardyggari.

Kirkja, tann 23. februar 2024

Amalia í Frammistovu, borgarstjóri.